# Páll Fangi setti met

## 6-MANNAFØR MENN Vinnaratíðin hjá klaksvíkingum var eitt vet betri, enn hon var tað hjá Hvessingi fyri 22 árum síðani

Tróndur Arge

Enn eina ferð var tað sera tætt og spennandi. Enn eina ferð vóru fleiri bátar við í kappingini um fremsta plássið, og enn eina ferð vóru tað klaksvíkingar, sum struku avstað við sigrinum.

Klaksvíkingar og miðvingar vóru í fantastiskari kapping um fremsta plássið, og Suðuroyarbátarnir, Tvørabáturin og Smyril, vóru í sera tættari kapping um triðja plássið. Riddarin úr Miðvági royndi fleiri ferðir at bjóða av, og onkra ferðina var hann fremstur, men Páll Fangi svaraði aftur, og á málinum var hann skutin frammanfyri Riddaran.

Tað var ikki eiti avrik, sum bestu bátarnir vístu hesa ferð. Tíðin hjá Páll Fanga var tann besta, sum nakað 6-mannafar við monnum nakrantíð hevur vunnið á Eystanstevnu við. Vinnaratíðin leygardagin var á teimum 1500 metrunum 7.17.24. Besta tíðin frammanundan var tann hjá Hvessingi í 1988. Ta ferðina róðu teir í Hvalvík og Streymnesi teir 1500 metrarnar í tíðini 7.18.30 ella 0.00.34 lakari enn Páll Fangi.

Tað vil siga, at tíðin hjá Riddaranum hesa ferð var eitt vet betri enn besta tíðin frammanundan leygardegnum.



*Klaksvískbáturin, Páll Fangi, setti met við síni vinnaratíð á Eystanstevnu*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Tvørabáturin, Smyril og Strálan fylgdu væl við á fyrsta partinum av teininum. Strálan var tann fyrsti, sum misti. Tvørabáturin og Smyril duttu eina bátslongd afturum teir báðar fremstu. Men frástøðan fram í oddin var ikki størri enn so, enn at tað er møguleiki fyri at taka tað innaftur hjá Smyrli og Tvørabátinum, tá ið tað næsta leygardag verður kapproður í Vági.

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Páll Fangi | 07:17.24 |
| 2 | Riddarin | 07:18.22 |
| 3 | Tvørabáturin | 07:23.11 |
| 4 | Smyril | 07:23.18 |
| 5 | Strálan | 07:26.22 |
| 6 | Skúgvur | 07:33.15 |
| 7 | Hósvíkingur | 07:41.12 |
| 8 | Jarnbardur | 07:49.08 |
| 9 | Lómur | 07:55.19 |
| 10 | Sølmundur | 08:06.11 |

**STØÐAN**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Páll Fangi | 21 |
| 2 | Tvørabáturin | 16 |
| 3 | Riddarin | 15 |
| 4 | Smyril | 14 |
| 5 | Strálan | 8 |
| 6 | Skúgvur | 7 |
| 7 | Hósvíkingur | 2 |
| 8 | Lómur | 1 |

# Blikur fann flogið

## 5-MANNAFØR DREINGIR Eftir kiksaran í Hvalvík megnaðu argjadreingir sannførandi at svara aftur á Skálafjørðinum

Tróndur Arge

Blikur vann á Norðoyastevnu, og á Sundalagsstevnu var Royndin Fríða fremst. Tí var talan um sera stóran spenning, tá ið dreingjabátarnir løgdu til brots. Í startspurtinum gekk tað javnt á, men tá ið hálvur teinurin var rógvin, var Blikur klárt á odda, og so kendist tað sum um, at eingin ivi var um, hvør fór at vinna.

Frá Bliki og aftur til Firvald á triðja plássi var ein stór bátslongd. Á øðrum plássi var Royndin Fríða, sum vann í Hvalvík. Royndin Fríða var eina stóra hálva bátslongd aftanfyri Blik. Tí kann roknast við, at tað verður sera tætt og spennandi, tá ið fjórði FM róðurin verður á Jóansøku, sum verður í Vági nú leygardagin.

Meðan fleiri av hinum vinnaratíðunum vóru millum tær bestu nakrantíð á Eystanstevnu, so var tað ikki soleiðis í hesi kappingini. Sjey ferðir áður hevur vinnaratíðin á Eystanstevnu verið betri, enn hon var tað hesa ferð. Besta tíðin var í 1982, tá ið Svanur av Skála vann við 29 sekundum skjótari tíð enn henni, sum henda kappingin varð vunnin við.

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Blikur | 05:10.16 |
| 2 | Royndin Fríða | 05:12.05 |
| 3 | Firvaldur | 05:14.18 |
| 4 | Jallurin | 05:16.24 |
| 5 | Teistin | 05:17.16 |
| 6 | Sílið | 05:19.15 |
| 7 | Svanur | 05:20.02 |
| 8 | Junkarin | 05:23.21 |
| 9 | Beinta | 05:29.23 |

**STØÐAN**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Blikur | 20 |
| 2 | Royndin Fríða | 19 |
| 3 | Jallurin | 11 |
| 4 | Teistin | 10 |
| 5 | Firvaldur | 10 |
| 6 | Svanur | 7 |
| 7 | Síliđ | 6 |
| 8 | Junkarin | 1 |
| 9 | Beinta | 0 |

# Fríggjarin hevur eyguni við Kvívíkingi



*Mynd: Jens Kristian Vang*

## 8-MANNAFØR Men tá ið tað mest galt um, kiksaði tað hjá Fríggjaranum, sum einki megnaði at gera við Kvívíking

Tróndur Arge

8-mannafarið hjá kvívíkingum er stórfavorittur at vinna FM fyri sjeyndu ferð. Leygardagin vann Kvívíkingur fyri triðju ferð í ár, og hóast tað ikki er eingin kapping um fremsta plássið, so er í løtuni ilt at ímynda sær annan FM vinnara enn Kvívíking.

Á málinum var eingin ivi. Kvívíkingur var klárt fremstur – eina bátslongd frammanfyri kappingarneytarnar. Men leingi var tað rættuliga spennandi. Fríggjarin úr Miðvági var bragdligur í startinum, og hann var leingi á odda. Eina løtu togaðust teir báðir – Fríggjarin og Kvívíkingur – men enn eina ferð var Kvívíkingur drúgvastur.

Tá ið teir næstu fóru um málið, var tað rættuliga tætt. Frá Fríggjaranum, sum var nummar tvey, og aftur til Árnfirðing, sum var nummar fýra, var bara ein stórur skutur.

Hóast teir ikki vunnu hesa ferð, so eiga miðvingar framvegis bestu vinnaratíðina á Eystanstevnu. Tað var í 1982, at Miðvingur vann í tíðini 6.40.49. Tíðin hjá Kvívíkingi hesa ferð var 0.12.12 lakari enn tann hjá miðvingum fyri 28 árum síðani. Hetta var næstbesta vinnaratíðin nakrantíð á Eystanstevnu.

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Kvívíkingur | 06:53.00 |
| 2 | Fríggjarin | 06:56.07 |
| 3 | Argjabáturin | 06:56.18 |
| 4 | Árnfirðingur | 06:57.16 |
| 5 | Ørvur | 07:10.24 |
| 6 | Knørrur | 07:14.15 |

**STØÐAN**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Kvívíkingur | 21 |
| 2 | Argjabáturin | 17 |
| 3 | Fríggjarin | 15 |
| 4 | Árnfirðingur | 13 |
| 5 | Ørvur | 8 |
| 6 | Knørrur | 7 |